# Ein sera væleydnað ovastevna í besta summarveðri



**Leygarkvøldið vóru sløk 600 fólk í dansi í tjaldinum í skúlagarðinum, har Terji og nólsoyingar spældu og undirhildu.**

BYGDASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað var áhugavert at uppliva ovastevnuna í ár frá byrjan til enda.

Í stevnuvikuni, stákaðust nólsoyingar við at mála og frýðka um, so tey mongu, sum væntandi leitaðu sær um fjørðin, skuldu uppliva eina nossliga bygd, har blíðskapur og vinsemi er í hásæti. Deiligt var at teljast millum teirra, sum í stevnuvikuni fingu nakrar ábøtur frá hondini, sum hava ligið á láni. Fólk vóru í góðum hýri, og hjálpsemi var stórt.

Veðurgudarnir boðaðu frá góðum veðri, bæði fríggjadagin og leygardagin, og øll tóktust vænta, at hetta fór at verða stevnan, sum setti øll met. Sunnudagin lovaði hann tó nakað av vindi, men tað var líka sum, at einki kundi sløkkja vónirnar um eina góða stevnu, frá fyrsta degi til tann seinasta. Og hesaferð »taptu« veðurgudarnir eisini so dyggiliga, tí sunnudagurin var eins góður sum fríggjadagurin og leygardagurin – við bæði sól og nógvum hita.

Sunnumorgunin sótu fólk úti í sólini, og gekk tú fram við, har tey familjur vóru samlaðar, fekst tú bæði mat og drekka. Onkur bjóðaði turran fisk og snaps!

## Ein lítil ólavsøka

Tað skerst ikki burtur, at millum bygdastevnurnar kring landið, verður ovastevnan ógvuliga væl vitjað. Kanska eitt sindur løgið at hugsa sær, tá ið havt verður í huga, at stevnan liggur eftir ólavsøkuna, og fólk tískil áttu at verið stevnutroytt. Líkt er tó til, at fólk »goyma« sær seinastu orkuna til ovastevnuna, sum nú hevur verið hildin fleiri fylgjandi ár.

Ovastevnan minnir um eina »lítla« ólavsøku, har fólk koma út um fjørðin at hugna sær og práta við vinir og kenningar. Um stevnuskráin er stór ella lítil, er neyvan so avgerandi fyri gestirnar. Hinvegin hevur tað ivaleyst týdning fyri peningaliga endamálið við stevnuni, at fólk hava høvi at sleppa sær av við nakrar krónur. Men tað, sum í fyrsta lagi er avgerandi fyri talið av vitjandi, er veðrið, og tað kundi á ongan hátt verið betur enn seinasta vikuskiftið.

## Sløk 600 fólk í dansi

Enn er ivaleyst nakað tíðliga at siga, hvat komið er burtur úr ymisku tiltøkunum, sum vóru, men neyvan er nakar ivi um, at stevnan í peningi eisini man hava sett øll met.

Tey størstu stevnutiltøkini var dansurin fríggjakvøldið og leygarkvøldið í tjaldinum í skúlagarðinum, kabarettin í Royndarhúsinum og tivoli á Nýggjavegi. Fríggjakvøldið spældi Countrybólkurin úr Klaksvík, og leygarkvøldið spældu Terji og nólsoyingar.

Sunnumorgunin spurdu vit ein av fyrireikarunum, hvussu nógv atgongumerki vórðu seld til dansin leygarkvøldið. Hesin metti, at talið táttaði í 600. Tað er sama tal, sum eitt rímiliga gott dansikvøld í Gundadalshøllini í Havn!

Felagssangurin undir Mikkjalsveggi leygarkvøldið og fýrverkið beint eftir, var eisini serstakliga væl eydnað. Her var so nógv fólk savnað, sum ongantíð áður.

## Ein »býur« av bátum

Umframt tey 2400 fólkini, sum Rytan flutti um Nólsoyarfjørð, vóru so nógvir bátar á Nólsoyarvík leygarkvøldið, sum eingin hevur sæð áður.

Regattasiglingin, sum byrjaði á Eiði, endaði í Nólsoy seint leygardagin. Nógvir bátar komu eisini úr Havnini og av Skálafjørðinum.



## Ritan sigldi við 2400 ferðafólkum á ovastevnu



**- Hetta er tað mesta, eg veit um, at Ritan hevur siglt við eitt vikuskifti, sigur Dánjal Húsgarð, skipari.**

BYGDASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Neyvan nakrantíð áður hevur so nógv fólk verið í Nólsoy eitt vikuskifti, sum seinasta vikuskiftið, tá ið ovastevnan varð hildin í fagrasta summarveðri.

Dánjal Húsgarð, skipari á Rytuni, sum røkir farleiðina um Nólsoyarfjørð, sigur, at hann loysti av á middegi síðsta fríggjadag, sum tey fyrstu tiltøkini á stevnuni fóru av bakkastokki út á seinnapartin og kvøldið.

- Frá tí, eg kom umborð og til seinasta túr sunnukvøldið, fluttu vit ikki færri enn 2400 ferðafólk um Nólsoyarfjørð, og tað er »enormt«, sum hann tekur til.

Hann sigur seg ikki vita um, at Ritan nakrantíð áður hevur siglt við so nógvum ferðafólkum eitt vikuskifti.

- Tað er so ikki hent í mínari tíð umborð á skipinum, leggur hann aftrat.

### Nógv fleiri enn í fjør

Dánjal sigur, at á ovastevnu í fjør, sum var metár í ferðafólkatali til og úr Nólsoy, sigldi Ritan við umleið 1200 fólkum, men hesaferð var talið tvífalt so stórt.

Sambært ferðaætlanini um stevnuna, vórðu sjey túrar lýstir at verða leygardagin og sunnunáttina, men hetta var ikki nóg mikið til tann nógva flutningin, ið var.

- Tá ið vit eru fýra mans umborð um summarið, hava vit loyvi at sigla við 125

ferðafólkum, men tað hendi fleiri ferðir, at øll, sum bíðaðu á bryggjuni, ikki sluppu við; tá sigldu vit nýggjan túr, soskjótt lýsti túrurin var sigldur.

Dánjal sigur, at neyðugt var at skifta manning, tá ið leið út á sunnunáttina, tí manningin, sum var umborð, hevði ikki loyvi at sigla meira.

- Vit hava ikki loyvi at sigla longur enn eitt ávíst tímatal; tí kom nýggj manning umborð á Rituna at loysa av sunnunáttina, sigur hann.

### Alt gekk væl

Skiparin sigur, at tað gekk ógvuliga væl at flyta fólk um Nólsoyarfjørð á ovastevnu, tá ið havt verður í huga, hvussu stórur flutningurin í veruleikanum var.

- Fólk vóru ógvuliga góð at fáast við, og vit høvdu so gott sum ongar trupulleikar á túrunum. Onkur einstakur royndi at snýkja seg umborð eftir, at skipið var fult, men viðkomandi fekk at vita, at tað bar ikki til. Vit taldu ferðafólkini hvønn túrin og hildu okkum nágreiniliga til loyvda talið.

Dánjal sigur, at ein maður, sum kom umborð í Havn, var bera máling um hendurnar og hevði klínt máling uppí setrini.

- Tað kundu vit ikki lata um okkum ganga, sigur hann.

Skiparin leggur dent á, at manningin annars ongar trupulleikar hevði av metstóra flutninginum á ovastevnu.

- Tað vóru minni enn so øll, sum fóru út til Nólsoyar at ballast. Í fleiri førum var talan um foreldur við børnum, sum fóru út um fjørðin og steðgaðu nakrar tímar, áðrenn tey fóru innaftur á meginlandið, sigur Dánjal Húsgarð.